# Nýggjur sáttmáli til pedagogarnar




75 ára føðingardagur.

Í sambandi við at Timburhandilin hevur 75 ára stovningardag verður móttøka á Hálsi í Tórshavn **fríggjadagin tann 31. oktober millum kl. 15 og 17.**

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

**Tórshavn:** Tel 31 12 50 • Fax 31 54 60 • ht@ht-tilfar.fo
**Sandur:** Tel 36 12 50 • Fax 36 11 50 • ht@ht-tilfar.fo • **Kambsdalur:** Tel 44 44 41 • Fax 44 48 41 • ht@ht-tilfar.fo
**www.timburhandilin.fo**

petur & petur • 320870



*Pedagogarnir hava fingið nýggjan sáttmála. Lønin hækkar 6,15 prosent frá 1. oktober í ár*

*Tilvildarlig mynd*

**Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya hava skrivað undir nýggjan sáttmála**

SÁTTMÁLI
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Foreldur, sum hava børn í ansingarskipanum, kunnu nú anda lættan. Sunnukvøldið skrivaðu Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálaráðið og Kommuna Arbeiðsgevarafelag Føroya undir nýggjan sáttmála, sum hevur gildi frá 1. oktober 2003 fram til 1. oktober 2005.

Karmurin er umleið 9 prosent, og lønin hjá pedagogunum hækkar 6,15 prosent, samstundis sum eftirlønin hjá hjálparfólkunum hækkar 2 prosent.

Eisini eru ymsar broytingar gjørdar í lønarstiganum.

– Í sáttmálaskeiðnum fara partarnir m.a. at samráðast um arbeiðstíðarreglur, soleiðis at tær kunnu verða partur av sáttmálanum, boðað Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya frá í tíðindaskrivi.

Ymsar smærri broytingar eru gjørdar í sáttmálatekstinum, og ein avtala er eisini gjørd um serstakar frídagar.

**Sosialurin** hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00
fax 34 18 01

heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo

VARPIÐ
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá
TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network
Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2



# Búmerki myndað av 2.000 kvinnum

**Heidi Hvidbro úr Klaksvík var millum tær 2.000 kvinnurnar, sum fyrst í oktober mánaði myndaðu Rosa-sloyfuna, sum er búmerki fyri bróstkrabba, framman fyri kongaslottinum í Oslo. Hon sigur, at tað var eitt ótrúligt upplivilsi at sleppa at verða við til hetta**

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Heidi Hvidbro var løgd undir skurð fyri bróstkrabba í 1998. Tá átti hon smábørn, og brádliga bleiv lívið broytt frá einum degi til annan. Men Heidi kom væl frá síni viðgerð, og er hon í dag púra frísk. Sum so nógvir aðrir krabbameinssjúklingar meldaði hon seg beinanvegin inn í Føroya Felag móti Krabbameini. Hartil meldaði hon seg eisini upp í norska krabbameinsfelagið, og fyrr í ár fekk hon innbjóðing til at vera við í herferð í sambandi við, at fokus verður sett á bróstkrabba kring heimin í oktobermánaði. Heidi sigur, at tað var ógvuliga tilvildarligt, hvør fekk innbjóðing.

– Tað var soleiðis, at tey vildu hava 1.500 kvinnur, tí so fóru vit at seta heimsmet, sigur Heidi. Og tá so samanumkom vóru tær ikki minni enn 2.000. So heimsmetið í at mynda eina sloyfu, sum var yvir ein kilometur til longdar varð rokkið so væl og virðiliga.

Tann 2. oktober stóð hon saman við yvir 2.000 øðrum kvinnum, sum eisini hava verið sjúkar av bróstkrabba, framman fyri norska kongshúsinum í Oslo og myndaði búmerki hjá teimum, sum verður kallað Rosa-sloyfan. Á odda fyri teimum var norska prinsessan Marthe Louise.

## Fáa sloyfuna fram

Endamálið við sloyfuni er fyrst og fremst at savna pening inn til gransking av bróstkrabba. Heidi sigur, at tað hevur gingið avbera skjótt, síðani sloyfan fyri fyrstu ferð sá dagsins ljós fyri tíggju árum síðani. Í dag er hon í yvir 40 londum, og hon verður borin av bæði monnum og kvinnum.

Í fleiri londum kring heimin hava ymisk tiltøk verið í sambandi við, at ljóskastarin verður settur á bróstkrabba í hesum mánaðinum. Heidi sigur, at til dømis í Sydney lýsti tað so vælkenda operahúsið ljósareytt ein heilan dag.

– Øll hesi tiltøkini eru við til at fáa sloyfuna betur fram. Fólk fáa eyguni upp fyri, at tað veruliga verður gjørt nakað fyri at útvega pening til granskingina av bróstkrabba, sigur Heidi Hvidbro.

## Mammografibussur

Nógv onnur tiltøk vóru í Noreg hesar dagarnar, meðan Heidi var har. Men hon sigur, at tað var serliga eitt, sum fangaði hennara áhuga. Og tað var ein sokallaður mammografibussur. Hesin bussurin koyrir runt til ávísar kommunur í Noreg, har kvinnur í aldrinum 50 – 69 ár fáa bjóðað eina mammografikanning.

– Framtíðarvónin og ynski hjá teimum er, at bussurin fer at kunna koyra runt alt Noreg og kanna kvinnurnar, sigur Heidi, sum heldur, at hetta er eitt fantastiska gott tiltak.

## Bót til Bata

Heidi sjálv er limur í einum undirbólki í Føroya Felag móti Krabbameini, sum eitur Bót til Bata. Tað eru umleið tíggju kvinnur í aldrinum 40 til 80 ár, sum hittast nakrar ferðir um árið. Allar hava tilfelags, at tær eru vorðnar frískar eftir skurðviðgerð ella aðra viðgerð fyri bróstkrabba.

– Ein skal hava verið frískur í tvey ár fyri at kunna gerast limur, og tað er tí, at títt egna skalt tú vera komin burturúr, áðrenn tú kemur í ein bólk, har tú millum annað tosar við kvinnur, sum júst hava fingið staðfest bróstkrabba, greiðir Heidi frá.

Endamálið hjá Bót til Bata er at taka hond um tær kvinnur, sum júst hava fingið staðfest krabbamein við at tær fáa tilboð um at tosa við eina, sum hevur verið í somu støðu.

Eisini skal bólkurin fremja áhugamál hjá kvinnum, sum eru viðgjørdar fyri krabbamein í brósti yvir fyri myndugleikunum. Her verður serliga hugsað um Heilsuverkið og útvegan av protesum.

Heidi sigur, at tað er sera hart at fáa at vita, at ein hevur fingið krabbamein, og tað kennist sum um, at lívið steðgar upp hjá einum.

– Tá er gott at vita, at tað eru nøkur sum kempa fyri teg, tá tú ikki sjálvur hevur orkuna til tað, tí viðgerðin er nóg mikið í sjálvum sær, sigur Heidi Hvidbro at enda.



*2.000 kvinnur myndaðu búmerki hjá bróstkrabbafelagnum uttan fyri norska kongshúsi fyrst í oktobre mánaði*

*Mynd: Scanpix*



*Heidi Hvidbro úr Klaksvík var við í Oslo. Hon sigur, at tað var heilt ótrúligt at kunna vera við at savnast saman við 2.000 øðrum kvinnum, sum hava verið ígjøgnum tað sama sum hon*

TELEFONBÓKIN 2004

Seinasta freist at lata broytingar inn er fríggjadagin 7. november 2003

**Í mars 2004 verður telefonbókin fyri ár 2004 borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum.**

Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist óbroytt.

**Hvítu síður**

Fríggjadagin 7. november 2003 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2004 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 650 í telefonbókini 2003,ið skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 79 68.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 62,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 2.000,00 kr. (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

**Gulu síður**

Fríggjadagin 7. november 2003 er seinasta freist, at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

**Prísir:**
(A)+(D) Standardlýsing ............................ kr. 650,00
(B) Stórt navn ........................................ kr. 50,00
(C) Innramming ...................................... kr. 100,00
(E) Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm) .. kr. 25,00
(sí dømi á s. 648 í Telefonbókini 2003)

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.
Skrásetingar-/Rættingarblað til Gulu síður er á síðu 649 í telefonbókini 2003, ið skal sendast til:
Teleforlagið, Føroya Tele, att. Martin Brodersen, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 32 11 66.

**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum*
**Postboks 27 · 110 Tórshavn · tel 30 30 30 · fax 30 30 31**
**www.nummar.fo · info@nummar.fo**
**www.gulu.fo · info@gulu.fo**